# Jólablaðið

# Ársins jólahandil

**Jólaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo


Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo


Inna Törnroos
inna@sosialurin.fo

Lagt til rættis: Ása A. Østerø, Anna Poulsen, Snorri Brend

## Hvat eta tit jólaftan?



***Miriam (34), Sandavágur***
*Tað verður ræst kjøt í ár, men tað er nokkso ymiskt hvat vit eta jólaaftan*



***Elisabeth Andreassen (15), Hoyvík***
*Vit plaga at eta dunnu ella gás*



***Heri Müller (28), Kvívík***
*Á døgurða eta vit ræstan fisk og ræstan sperðil, og um kvøldið er kalt borð*



***Rut Dam (74), Argir***
*Vit eta gás*



***Jóhan Davidsen (55), býr í Havn, men ættaður úr Æðuvík***
*Jólaftan plaga vit at eta dunnu og gás*



***Johannes Falkenberg (15), Hoyvík***
*Vit eta dunnu jólaaftan*

## Syngja jólini inn í Klaksvík



Í annaðkvøld, 9. desember klokkan 19 verða jólini sungin inn í Christianskirkjuni í Klaksvík.

Barnakórið úr KFUM og K tekur lut, eins og nakrir næmingar úr Tónlistaskúlanum. Hanus á Gørðum prestur hevur eina andakt.

Tað verður eisini møguleiki at lata ein gávu til tiltakið "Í Menniskjum góður tokki!"

